# Djur som ingen sett utom vi




"Djór, eingin annar hevur sæð"
Høvundur: Ulf Stark (Svøríki)
Myndprýðari: Linda Bondestam (Finnland)
Forlaget Berghs, 2016

Vann Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2017

Søgugongd: Djór, eingin annar hevur sæð er ein yrkingabók, har lesarin lærir um nógv nýggj djór, sum liva í øðrvísi verðum og umhvørvi enn vit, men sum kortini hava somu kenslur sum tú og eg.

Evni: djór, kenslur, einsemi, at hoyra til, ræðsla, náttúra, hugflog, lív, skaldskapur

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørji djór finna tit? Hvussu siga djórini? Les yrkingarnar upp og finn uppá ymiskar rørslur til, t.d. flúgv sum firvaldurin, trampa sum Bombomdjórið og hvíl sum hugskotsdjórið.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, at bókin snýr seg um?**

**2. Hyggið at síðuni við Bombomdjórinum. Hvat heldur tú hendir her og hví?**

**3. Hvussu síggja djórini í bókini út? Tosið saman í bólkum. Arbeiðið síðani saman tvey og tvey og finnið uppá nýggj djór, sum eingin annar hevur sæð. Finnið uppá nøvn til djórini.**

**4. Djórini á permuni hava eingi nøvn. Finnið uppá nøvn til teirra.**

### MIÐLINGAR

**1. Tosið saman í bólkum um, hvat rím er. Arbeiðið saman tvey og tvey, veljið eina yrking og leitið eftir rímum. Finnið uppá nøkur rím afturat til orðini, tit finna.**

**2. Veljið eitt djór úr bókini, lesið yrkingina og hyggið at myndunum. Finnið síðani uppá eina samanhangandi søgu um djórið. Byrjið við "Einaferð var tað..."**

**3. Djórasamrøða. Arbeiðið saman tvey og tvey og skiftist um at vera tíðindafólk og djór. Nýt títt hugflog til at finna uppá eina søgu um teg sum eitt higartil ósætt djór og fortel hvussu tað kennist.**

**4. Yrkingamassasja: Les nakrar yrkingar upp úr bókini, t.d. "Bombomyrkingina" og "Klumpantropus". Finnið uppá hóskandi massasjurørslur til yrkingarnar. Lesið síðani yrkingarnar, meðan næmingarnir skiftast um at massera hvørjum øðrum.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat hildu tit um bókina? Var okkurt, ið var torskilt? Dugir tú at síggja mynstur úr øðrum søgum?**

**2. Hyggið at umhvørvinum, sum tey ymisku djórini liva í. Hvat skal til, fyri at menniskju og djór trívast í einum umhvørvi? Tosið saman í bólkum.**

**3. Gerið ein sjónleik við íblástri úr yrkingunum. Arbeiðið saman tvey og tvey og veljið eina yrking at arbeiða við. Hugsið um, hvørjar kenslur yrkingin fær fram og framførið fyri bólkinum.**

**4. Hyggið nærri at yrkingunum. Finnur tú yrkingar, sum viðgera tað at vera við í einum felagsskapi ella at vera uttanfyri? Tosið saman í bólkum um hesar kenslurnar og yrkingarnar.**

**5. Veljið eina yrking úr bókini. Skrivið eina tíðindagrein um djórið, sum eingin enn hevur sæð.**

**LES EISINI:**
**Loftar tú mær? eftir Rakel Helmsdal**
**Råttan Bettan och masken Baudelaire eftir Annika Sandelin og Karoliina Pertamo**
**Sorsa Aaltonen ja lentämisen oireet eftir Veera Salmi og Matti Pikkujämsä**

## MÁLBITIN

# "Kenslur"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Känslor** | **Følelser** | **Følelser** | **Tilfinningar** | **Kenslur** | **Misigissutsit** | **Tunteet** | **Dovddut** |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren**!